# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Eisini Heimsins besti

**Enn ein heiður til Ronaldo. Brasilska Marta gjørdist Heimsins besti spælari hjá kvinnunum**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Síðani Ronaldo vann "Ballon d´or" og gjørdist ársins spælari í Evropa fyrst í desember, hevur hann vunnið tvey heiti. Saman við Manchester United eydnaðist tað Ronaldo at vinna heimsmeistaraheitið fyri felagslið, og nú er hann av FIFA kosin at verða Heimsins besti fótbóltsspælari. Tað var stóra brasilska legendan, Pelé sum handaði einum rørdum Christiano Ronaldo prógvið um, at hann er Heimsins besti fótbóltsspælari hjá monnum:



*Ronaldo úr Portugal og Marta úr Brasil vórðu í gjár – ikki heilt óvæntað – kosin sum bestu fótbóltsspælararnir í heiminum í 2008*

*Mynd: Polfoto/AP*

## Ársins spælari hjá FIFA

2008: Cristiano Ronaldo, Portugal (Manchester U.)
2007: Kaká, Brasilia (Milan)
2006: Fabio Cannavaro, Italia (Real Madrid/Juventus)
2005: Ronaldinho, Brasilia (Barcelona)
2004: Ronaldinho, Brasilia (Barcelona)
2003: Zinedine Zidane, Frakland (Real Madrid)
2002: Ronaldo, Brasilia (Real Madrid)
2001: Luis Figo, Portugal (Real Madrid)
2000: Zinedine Zidane, Frankrike (Juventus)
1999: Rivaldo, Brasilia (Barcelona)
1998: Zinedine Zidane, Frakland (Juventus)
1997: Ronaldo, Brasilia (Inter Milan)
1996: Ronaldo, Brasilia (Barcelona/PSV)
1995: George Weah, Liberia (Milan)
1994: Romario, Brasilia (Barcelona)
1993: Roberto Baggio, Italia (Juventus)
1992: Marco van Basten, Holland (Milan)
1991: Lothar Matthäus, Týskland (Inter)

Kvinnur:
2008: Marta, Brasilia (Umeå)
2007: Marta
2006: Marta
2005: Birgit Prinz, Tyskland (Frankfurt)
2004: Birgit Prinz
2003: Birgit Prinz
2002: Mia Hamm, USA (Washington Freedom)
2001: Mia Hamm

– Hetta er ótrúligt, og ein ógvuliga serstøk løta í lívi mínum. Nú vil eg bara siga við systur mína, og mammu mína, at tær kunnu byrja at senda fýrverkið upp í luftina. Ronaldo vann heiðurin í kapping við Lionel Messi, Xavi, Kaká og Fernando Torres.

### Pelé spáddi rætt

Í fjør handaði Pelé eisini virðislønina til Heimsins besta spælara, sum tá var landsmaðurin, Kaká. Pelé tvíheldur, at hann spáddi, at Christiano Ronaldo fór at vinna heiðurin í ár: - Eg minnist eg segði við hann: "at næsta ár vinnur tú!". Greiddi Pelé frá, tá hann handaði virðislønina til Ronaldo. Ronaldo er valdur til Heimsins besta av landsliðsvenjarum og landsliðskiparum úr øllum FIFA-londum. Brasilska, Marta, sum spælir við Umeå í Svøríki, vann heiðurin sum ársins spælari hjá kvinnum, triðja árið á rað: - Eg vil gjarna takka Gudi, mínari familju, og øllum sum hava trúð uppá meg gjøgnum árini. Segði Marta, aftaná at hava vunnið heiðurin í kapping við, Kelly Smith, Birgit Prinz, Nadine Angerer og Christiane. "Fair Play"- virðislønin hjá FIFA fór til Armenia og Turkaland, meðan virðislønin hjá FIFA-forsetanum fór til tað amerikanska kvinnulandsliðið. FIFA gav eisini tí palestinska fótbóltssambandinum ein serstakan prís fyri at hava fingið altjóða fótbólt á breddan á Vestara Áarbakka.

# Ørvur fremst millum tey ungu

**Odd Andreassen og Oddmar Nielsen úr Ørvi, sum venja í Runavík, vóru bestu skjúttarnir í barnakappingini. Teir lógu nummar eitt og trý innleiðandi, men endaðu báðir í finaluni, har Odd Andreassen vann.**

**Nummar tvey innleiðandi gjørdist Sirið Rein úr Tambar, og hon fekk triðja plássið at enda. Bert recurveskjúttar eru millum børnini**

BOGASKJÓTING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Úrslitini innleiðandi vóru ikki nakað serliga góð, men har kann tað spæla inn, at ongin av skjúttunum hevur skotið á Eiði fyrr. Ymiskt ljós og hiti spæla sera nógv inn, og tað var eitt sindur heitari og eitt sindur ljósari á Eiði, í mun til hini støðini har kappingar eru.

Í hálvfinalunum skutu Odd Andreassen og Rógvi Dalsgarð. Odd Andreassen vann dystin við 19 stigum, og so var hann klárur til finaluna.

Í hinari hálvfinaluni skutu Oddmar Nielsen og Sirið Rein. Dysturin gjørdist sera áhugaverdur, tí Sirið Rein plagar vanliga at vera millum sterkastu skjúttar í finalum. Hetta legði Oddmar Nielsen onki í, og stríddi seg at vinna við einum stigið. 98-97 endaði dysturin.

Í bronsufinaluni hittust Sirið Rein og Rógvi Dalsgarð. Sirið Rein vann dystin við fimm stigum.

Í finaluni skutu vinmenninir Odd Andreassen og Oddmar Nielsen. Báðir høvdu eina rímiliga góða skjóting, men summi mistøk komu fyri, ið vanliga ikki henda. Oddmar Nielsen gjørdi fleiri enn Odd Andreassen. Sostatt vann tann seinni kappingina hjá børnunum, við sjey stigum, sum er í meira lagið, tá mann hugsar um, hvussu javnir teir eru til venjing.